# VIKULIÐIÐ

vodafone deildin VIKA 17

*Ítróttartoymi úttekur Vikuliðið, og eru leikarans avrik mett út frá Vodafone-dystunum í farnu viku.*




Uppstilling: **3-4-3**

# FSF í villareiði

**LØGMANSSTEYPIÐ** Borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, er sinnaður at tosa við Fótbóltssambandið av nýggjum, um áhugin fyri at spæla á ólavsøku framvegis er har

Hilmar Jan Hansen

At finalan um Løgmanssteypið kann enda við at verða spæld í Havn á ólavsøku, er framvegis ein møguleiki, hóast einki samband hevur verið millum Fótbóltssambandið og Tórshavnar kommunu í ein góðan mánað.

– Eftir at vit høvdu fingið at vita, at finalan ikki skuldi spælast í Gundadali á ólavsøku, fingu vit eina kunning um, at hon skuldi spælast 1. august í staðin. Men tá einki bleiv sagt um, hvar hon skuldi spælast, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, sum ikki útihýsir, at ólavsøkan aftur kann koma upp á tal.

– Sum sagt, hava vit einki hoyrt aftur, men hevur Fótbóltssambandið hug at venda aftur til málið, eru vit eisini klárir at koma á fund, so vit kunnu tosa okkum fram til eina møguliga loysn.

Heðin Mortensen heldur annars, at tað virkar, sum Fótbóltssambandið ikki ordiliga veit, hvat tað vil við dystum í høvuðsstaðnum.

– Annanhvønn dag fáa vit fyrispurningar um at brúka Tórsvøll, samstundis sum Fótbóltssambandið hevur sagt upp sáttmálan um Tórsvøll, so tað er eitt sindur ringt at lesa av, hvat Fótbóltssambandið vil, sigur borgarstjórin.

– Fyri okkum hevur tað stóran týdning, at vit fáa klárar útmeldingar, so vit kunnu taka støðu til møguligar íløgur á Tórsvølli. Ein spurningur er, um grasið skal takast av og graslíki leggjast á í staðin, men tað fáa vit ikki tikið støðu til, fyrr enn vit vita, hvat Fótbóltssambandið vil.

hilmarjan@sosialurin.fo

# Fleiri vilja hava finaluna

**LØGMANSSTEYPIÐ** – Sjálvur vildi eg helst, at finalan varð spæld í Havn á ólavsøku, men endalig støða er ikki tikin til enn, hvussu vit gera, sigur formaðurin í kappingarnevndini hjá FSF, Karl Vidtfeldt, ið avsannar, at avgerð longu er tikin um, at finalan verður í Klaksvík

Hilmar Jan Hansen

Ein av stórhendingunum í føroyskum fótbólti er finalan í kappingini um Løgmanssteypið, sum er størsti einstaki dystur í føroyskum fótbólti, tí vinnarin verður steypavinnari og fær við sigrinum atgongd til europeiskan fótbólt. At vinna steypakappingina verður av fleiri liðum mett sum líka stórur vinningur, sum at gerast føroyameistari, og her kunnu eitt nú lið gera seg galdandi, sum annars kanska ikki hava orku og evni til at enda fremst eftir 27 landskappingarumfør.

Í hesum døgum verður telvað dúgliga, so finnast kann fram til, hvussu verður við hesi finalu í ár, tí tað hevur ikki gingið heilt sum eftir ánni at avgreiða finaluna á ólavsøku, sum annars av mongum verður mett sum tað optimala.

Fyri einum góðum mánaði síðani kunngjørdi Fótbóltssambandið, at av tí at semja fekst ikki um at spæla finaluna í kappingini um Løgmanssteypið á ólavsøku, var hon flutt til sunnudagin 1. august. Hetta hendi, eftir at tingingar høvdu verið millum Fótbóltssambandið og Tórshavnar kommunu.

Ósemjan snúði seg um kostnað, tí kommunan vildi hava 100.000 krónur fyri at lata ovara vøll í Gundadali til steypafinaluna á ólavsøku, men tað var Fótbóltssambandið ikki sinnað at rinda. Hinvegin legði Fótbóltssambandið upp til, at tey bæði finaluliðini fingu ein triðing av inntøkunum, Tórshavnar kommuna ein triðing og Fótbóltssambandið síðsta triðingin, men hesum tók kommunan ikki undir við.

## Avsannar Klaksvík

– Eg vil siga tað soleiðis, at fleiri góð hugskot eru komin fram um, hvussu steypafinalan kann verða avgreidd í ár, uttan at eg vil nevna nakra ítøkiliga loysn. Í verandi støðu standa allir møguleikar opnir, og nú skulu allir partar so tosa saman, so vit finna tær røttu loysnirnar, sigur Karl Vidtfeldt, formaður í kappingarnevndini hjá Fótbóltssambandinum.

Ein møguleiki, sum nú er komin fram, er at steypafinalan skal spælast í Klaksvík leygardagin á Summarfestivalinum, sum er 7. august, og um so verður, má Fótbóltssambandið flyta finaluna enn eina ferð – bæði tíð og stað. Men Karl Vidtfeldt avsannar, at nøkur avgerð er tikin um hetta:

– Nei, vit hava onga endaliga avgerð tikið. Kappingarnevndin fundast hesa vikuna, har vit fara at venda øllum teimum møguleikum, sum eru, og so royna vit at gera málið klárt, so tað kann verða viðgjørt í starvsnevndini. Tann fundurin verður nokk ikki fyrr enn í næstu viku, tí onkrir eru burturstaddir í UEFA-ørindum seinna part av hesi vikuni, sigur hann.

– Sjálvur vildi eg helst, at finalan varð spæld í Havn á ólavsøku, tí tær finalurnar hava givið okkum ótrúliga nógvar og góðar upplivingar. Men nú fáa vit so at síggja, hvørjum viðgerðin av málinum endar við. Í øllum førum skulu vit helst sum skjótast finna fram til, hvør endaliga loysnin verður.

## Føroyska Vodafonedeildin

vodafone deildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 5 | 3 | 2 | 0 | 11 | 5 | +6 | 11 |
| 2 | HB | 5 | 3 | 2 | 0 | 9 | 6 | +3 | 11 |
| 3 | B68 | 5 | 3 | 0 | 2 | 13 | 9 | +4 | 9 |
| 4 | Víkingur | 5 | 2 | 2 | 1 | 12 | 10 | +2 | 8 |
| 5 | ÍF | 5 | 1 | 3 | 1 | 5 | 5 | 0 | 6 |
| 6 | EB/Streymur | 5 | 1 | 2 | 2 | 6 | 6 | 0 | 5 |
| 7 | FC Suðuroy | 5 | 1 | 2 | 2 | 9 | 11 | -2 | 5 |
| 8 | B71 | 5 | 1 | 2 | 2 | 7 | 13 | -6 | 5 |
| 9 | NSÍ | 5 | 1 | 1 | 3 | 6 | 7 | -1 | 4 |
| 10 | AB | 5 | 0 | 2 | 3 | 9 | 15 | -6 | 2 |